## Nógvar avtalur í B68

Seinastu dagarnar eru nógvar avtalur gjørdar á Toftum. B68 boðar á heimasíðu síni frá, at felagið hevði longt sáttmálarnar við Jóhan Petur Poulsen og Kristian Anthon Andreasen. Talan er um tveyára sáttmálar. Báðir tveir hava teir verið nógv raktir av skaðum, men sambært heimasíðuni hjá B68 eru teir við at koma fyri seg aftur. Ivasamt er tó, um teir koma at gera seg galdandi á besta liðnum í ár. Umframt tað boðar B68 frá, at Jóhan Dávur Højgaard og Jóhan Petur Poulsen eru settir sum ungdómsvenjarar hjá B68 fyri tey bæði komandi árini. Eisini heldur Johnleif Gerðisá áfram sum samskipari hjá B68.



## Kerr broytir landskappingina

Fótbóltssambandi hevur, eftir ynski frá landsliðsvenjaranum Brian Kerr, flutt eitt heilt umfar í Vodafonedeildini. Teir fýra dystirnir, sum upprunaliga skuldu spælast 9. august, eru framskundaðir til 8. august. Hetta tí, at landsliðsvenjarin ynskir at landsliðsleikararnir eru tøkir 9. august. 12. august skal landsliðið spæla stórdyst ímóti Fraklandi, og hesa til uppgávu ynskir landsliðsvenjarin helst at hava so góða tíð sum gjørligt.



Myndin har Njál Djurhuus stendur longst til vinstru, er úr norska blaðnum Krigsropet, og er tikin í samband við sjónbandaupptøkurnar av nýggjum lag, gjørt til liðið hjá teimum heimleysu í samband við NM í gøtufótbólti

# Fótbóltskapping fyri heimleys

**Seinast í juni skipaði deildin hjá Frelsunnarherinum, sum Njál Djurhuus er partur av, fyri noregsmeistaraskapinum í fótbólti fyri tey heimleysu, sum halda til á gøtuni**

HERI SIMONSEN
*heris@sosialurin.fo*

Frelsunnarherurin í Noregi hevur gjørt nógv forkunnug átøk fyri at lívga um tey heimleysu fólkini, sum liva á gøtuni í stórbýunum í Noregi. Fyri stuttum vóru fleiri av teimum heimleysu við í einari stórslignari filmsverkætlan, sum var nevnd "Gatas Peer Gynt", har m.a. Njál Djurhuus sjálvur hevði ein hjáleiklut, sum prestur. Seinast í juni mánað var so ein ógvuliga sjáldsom fótbóltskapping í Oslo, sum Frelsunnarherurin skipaði fyri.

### NM fyri heimleys

Njál Djurhuus vitjaði inni í Miðlahúsinum mikudagin, og hann greiðir soleiðis frá serligu fótbóltskappingini: - Talan var um noregsmeistaraskapið í gøtu-fótbólti, sum vit skipaðu fyri tann 26. og 27. juni. NM fór fram á Youngs-torginum mitt inni í Oslo-býi, har ein vøllur var gjørdur, og har vóru eisini áskoðarapláss til 1.500 áskoðarar. Tað var ein ótrúlig uppliving at síggja heimleys gøtufólk koma heilt úr Tromsø, og nógvum øðrum býum í Noregi, fyri at sleppa at spæla fótbólt ímóti øðrum gøtufólkum. Tey spældu ikki bara um NM fyri gøtufólk, men tey spældu eisini um rættin til at blíva úttikin til norska gøtufólka-landsliðið, sum skal taka lut í heimsmeistaraskapinum fyri gøtufólka-landslið, sum verður í italska býnum, Milano í september. Vit hava fingið eitt gott samstarv við Vålerenga (norskir meistarar í 2006 red.), sum hava tikið okkum inn undir sínar veingir, og teir hava givið okkum ein venjara, sum nú hevur hjálpt okkum í eitt hálvt ár. Harumframt hava teir latið onnur hjálparfólk, sum stuðla okkum og eru við í arbeiðnum. Freddie dos Santos, sum er millum bestu spælarnar hjá Vålerenga handaði eisini steypið til gøtufólkini í Stavanger, sum vunnu NM í gøtufólka-fótbólti, greiðir Njál frá. Ì samband við NM var eitt ógvuliga sjáldsamt og stuttligt sjónbandalag gjørt, sum hevur verið at síggja í øllum norskum sjónvarpsstøðum. Njál sjálvur syngur eina strofu í sanginum: "Vi scorer mål", og heldur hann, at tað var ógvuliga stuttligt at vera við. – Hetta er tað, sum mær dámar. At vera við hesum fólkunum úti á gøtuni, staðfestir Njál. Fimm útispælarar og ein málverji vóru á hvørjum liði, og hvør dystur vardi tvær ferðir 15 minuttir. Fyrrverandi Vålerenga-spælarin, Erik Foss er landsliðsvenjari hjá norska gøtufólka-landsliðnum, og Njál heldur, at Erik Foss hevur eina torføra uppgávu fyri framman at taka út landsliðið, sum skal umboða Noreg til HM í Milano.

### Einki reytt kort

Njál er sera fegin um, at liðini vístu góðan atburð á vøllinum. – Har vóru nøkur, sum fingu eitt gult kort, men eingin fekk tað reyða kortið, fegnast Njál um. – Har var gott lag á fólki, og um kvøldið høvdu vit hugnaløtur, har vit m.a. grillaðu pylsur. Nógv á liðunum vóru fyrrverandi fótbóltsspælarar, og teir dugdu veruliga væl við bóltinum. Hesi fólkini duga veruliga nógv ymisk ting, staðfestir Njál. – Ein kann ongantíð forsíggja hvør fær rúsevnistrupuleikar, ofta kann tað vera tey bestu fólkini sum enda úti í rúsevnistrupuleikum. Njál heldur, at tey sum tóku lut í kappingini blivu lyft sálarliga av stórfingna tiltakinum. – Henda kappingin prógvar, at ein skal ikki bara hugsa um elituna, tá ein skipar fyri fótbóltskappingum, ein skal eisini hava breidduna við. Og í breidduni, har eru vit, slær Njál fast.